## Gerðabók hjá Vestmanna bygdarráð
## Bygdarráðsfundur tann 26. februar 2025, kl. 17.00

**Bygdarráðslimir á fundi:** Sára Jógvansdóttir, Anja Haldansen, Karl A. Olsen, Pauli Magnussen, Jákup S. Jóanesarson, Janus Atli Jensen og Fróði Skúvadal

**Skrivari:** Rúna Koba

Áðrenn fundin greiddi Sára Jógvansdóttir, borgarstjóri, frá, at síðani skráin er løgd, er eitt nýtt mál innkomið: Skipan av bygdarráðnum. Borgarstjórin heitti á bygdarráðið um at loyva, at málið verður sett á skrá. Eitt samt bygdarráð gekk áheitanini á møti. Málið varð sett á skrá sum mál nr. 17.

Vísandi til grein 18, stk. 2, í løgtingslóg nr. 87 frá 17. mai 2000, um kommunustýri, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 59 frá 22. mai 2023, hevur Símin Jákup Højsted boðað frá, at honum barst frá at møta á fundinum, tí hann er burturstaddur. 1. tiltakslimur Fróði Skúvadal fekk fundarboð tann 30. januar og játtaði at møta.

Sambært grein 18, stk. 3, í løgtingslóg nr. 87 frá 17. mai 2000, um kommunustýri, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 59 frá 22. mai 2023, skal kommunustýrið gera av, um treytirnar fyri innkalling av tiltakslimi eru loknar.

Bygdarráðið samtykti einmælt at góðkenna innkallingina av Fróða Skúvadal sum tiltakslim.

Til viðgerðar fyri **opnari hurð**:

**Mál 12**
Stýrisskipan fyri Vestmanna bygdarráð
J.nr.: 1002-1-2025

Bygdarráðið viðgjørdi á fundi tann 22. januar 2025 broyting í stýrisskipan fyri Vestmanna bygdarráð.

Bygdarráðsnevndirnar verða umskipaðar til hesar nevndir: Fíggjarnevnd, tekniska nevnd, trivnaðarnevnd og vinnu- og havnarnevnd

Uppskotið varð einmælt samtykt við 1. viðgerð.

**Viðv. 12**
Uppskotið varð einmælt samtykt við 2. viðgerð.

**Mál 13**
Umsókn um stuðul – Vestmanna sangkór
J.nr.: 2000002-13-2024

Fíggjarnevndin viðgjørdi á fundi tann 11. februar 2025 umsókn um stuðul frá Vestmanna sangkóri til Kórstevnuna 2025.

Á fundi á kommunuskrivstovuni tann 10. februar 2025 handaðu umboð fyri Vestmanna sangkór umsókn um fíggjarligan stuðul til kórstevnuna í Vestmanna tann 2. – 3. mai 2025.
Søkt varð um kr. 27.000.

Nevndin samtykti einmælt at mæla til at stuðla við kr. 27.000.

**Viðv. 13**
Tilmælið frá Fíggjarnevndini varð einmælt samtykt

**Mál 14**
Reglugerð fyri kirkjugarðar
J.nr.: 431002-3-2024

Vestmanna bygdarráð viðgjørdi á fundi tann 26. novembur 2024 tilmæli frá trivnaðar- og umhvørvisnevndini um broyting í reglugerð fyri kirkjugarðar.

Trivnaðar- og umhvørvisnevndin mælti til at samtykkja, at stk. D. Festibræv verður broytt til stk. D. Jarðað í somu grøv og at senda uppskotið til kikjuráðið til ummælis.

Tilmælið frá trivnaðar- og umhvørvisnevndini varð einmælt samtykt.

Kirkjuráðið viðgjørdi skrivið á fundi tann 13. januar 2024 og tekur undir við broytingini í reglugerðini fyri kirkjugarðar; tó við hesi viðmerking til § 3. "*Kirkjuráðið hevur onga kirkjugarðsbók. Hendan varð latin Vestmanna kommunu fyri mongum árum síðani. Prestur førir dagbók, hvørja ferð onkur doyr, og jarðarferð hevur verið.*"

Uppskot frá trivnaðar- og umhvørvisnevndini til reglugerð fyri kirkjugarðar við hesum dagføringum varð sent bygdarráðnum til støðutakan.

- dagføring av § 3 eftir viðmerking frá kirkjuráðnum
- broytt gildiskoma til 1. mars 2025
- tillaging sambært nýggju stýrisskipanini fyri Vestmanna bygdarráð

**Viðv. 14**
Uppskotið varð einmælt samtykt.

**Mál 15**
Søluskúrur við bátahylin
J.nr.: 8206002-1-2025

Havnanevndin viðgjørdi á fundi tann 4. februar 2025 málið um sølutorgið, sum ætlanin er at gera við skúrarnar við bátahylin.

Nevndin samtykti at leggja málið fyri bygdarráðið at skifta orð um.

Eingin játtan er til søluskúrin á fíggjarætlanini fyri 2025

**Viðv. 15**
Bygdarráðið samtykti at heita á vinnu- og havnarnevndina at arbeiða víðari við málinum.

**Mál 16**
Fyrispurningur frá Faer Isles Distillery um leigu ella keyp av øki.
J.nr.: 8216002-5-2024

Havnarnevndin viðgjørdi á fundi tann 4. februar 2025 prinsipiellan fyrispurning frá Faer Isles Distillery um leigu ella keyp av øki.

Havnarevndin mælti til at leiga Faer Isles Distillery økið vestanfyri økið, sum er játtað VestPack – sambært uppskoti frá teknisku deild dagf. 4. februar 2025.

Fíggjarnevndin viðgjørdi tilmælið frá havnarnevndini á fundi tann 11. februar 2025.

Fíggjarnevndin samtykti einmælt at mæla til at lata Faer Isles Distillery prinsippgóðkenning til at leiga økið.

**Viðv. 16**
Tilmælini frá havnarnevndini og fíggjarnevndini vórðu einmælt samtykt.

**Mál 17**
Skipan av bygdarráðnum
J.nr.: 8403002-1-2024

Í samband við, at bygdarráðið tann 26. februar 2025 einmælt samtykti nýggja stýrisskipanina fyri Vestmanna bygdarráð, skal bygdarráðið velja limir og tiltakslimir til tær nýggju føstu nevndirnar.

**Viðv. 17**

Í **trivnaðarnevndina** vórðu vald: Anja Haldansen, Pauli Magnussen og Jákup S. Jóanesarson (Tiltakslimur: Karl A. Olsen)

Í **vinnu- og havnanevndina** vórðu vald: Karl A. Olsen, Anja Haldansen og Jákup S. Jóanesarson. (Tiltakslimur: Janus Atli Jensen)

**Kunning og Kjak**

- Møguligt keyp av ogn á Toftavegi 2, matr. nr. 205cl (J.nr.: 8201002-2-2025)
- Hølisviðurskiftir hjá VEKS
- Viðtøkubroytingar fyri SEV
- Stuðul til heildarætlanina Inni á Fjørð (Havnarnevndin J.nr.: 803002-1-2025)

Bókin lisin. Fundurin lokin kl 18:20

Sign.:

Sára Jógvansdóttir Anja Haldansen Karl A. Olsen

Pauli Magnussen Jákup S. Jóanesarson Janus Atli Jensen Fróði Skúvadal